VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

**Dagfesting:** 25.09.2024 kl. 18:00
**Fundarstaður:**
**Málnr.:** 21/00003

Til staðar: Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Jacobsen, Jens Gaardlykke, Jóanis Albert Nielsen, Jóhan á Mýrini

Varalimir: Jóhan á Mýrini

Ikki til staðar: Jóhannus Hansen og Jens Gaardlykke

Aðrir partar:

Fundarskrivari: Jóhan Hendrik Ellefsen


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til kunningar** | | | |
| 8/24 | 24/00045-13 | Mál beind í nevnd 8-24 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 46/24 | 24/00390-2 | Navn til nýggja veg Norðuri á Heiðum | 4 |
| 47/24 | 23/00520-3 | Veganavn til útstykking í Vatnsoyrum | 5 |
| 48/24 | 24/00289-3 | Umsókn um sundurbýti matr.nr. 92f í Sandavági | 6 |
| 49/24 | 24/00347-2 | Umsókn um sundurbýti matr.nr 210a í Sandavági | 7 |
| 50/24 | 24/00303-2 | Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr 258c og 78a í Sandavági | 8 |
| 51/24 | 24/00272-3 | Áheitan at gera matr.nr83u í Sandavági til fríøki | 9 |

VÁGA KOMMUNA


| | | | |
|---|---|---|---|
| 52/24 | 24/00332-2 | Umbøn um girðing við matr.nr 331c | 10 |
| 53/24 | 24/00306-3 | Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr.nr 91q í Sandavági | 11 |
| 54/24 | 24/00047-12 | Umsókn um fyribilsloyvi at seta skúr við bátahylin í Sandavági | 12 |
| 55/24 | 24/00400-1 | Møguligt keyp av matr. nr. 139, 179b, 207 og 315a í Sandavági | 13 |
| 56/24 | 24/00386-5 | Uppskot frá borgarstjóranum um, at fíggja fjarlestur til meritnámsfrøði hjá starvsfólkum á dagstovnaøkinum | 14 |
| 57/24 | 24/00402-2 | Ivanshús | 15 |
| 58/24 | 24/00397-1 | Fíggjarætlan fyri 2025 | 16 |
| | | | |


Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**Til kunningar**

## 8/24 Mál beind í nevnd 8-24

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
| --- | --- | --- |
| 1 Býráðið | 25.09.2024 | 8/24 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 25. september 2024:**

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

## 46/24 Navn til nýggja veg Norðuri á Heiðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 16.09.2024 | 49/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 46/24 |

**Málslýsing:**

Í samband við útstykking Norðuri á Heiðum í Miðvági, er nýggjur vegur gjørdur. Veganavnanevndin komin við tilráðingum til hvussu vegir inn frá Skaldavegi kunnu eita.

Nevndin verður biðin um at taka støðu til hvussu vegurin skal eita.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 16. september 2024:**

Mælt verður til at fylgja tilráðingini hjá veganavnanevndini og nevna vegin Birtulíð.

**Býráðið 25. september 2024:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan: ____________

VÁGA KOMMUNA

## 47/24 Veganavn til útstykking í Vatnsoyrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 16.09.2024 | 48/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 47/24 |

**Málslýsing:**

Í samband við at nýggj útstykking verður gjørd í Vatnsoyrum, hevur borgari sent inn uppskot um at navngeva vegin *undir Leitinum.* Veganavnanevndin fyri Vatnsoyrar og Miðvág, er komið við eini tilráðing fyri hvussu vegurin kann eita:

1. Undir Leiti
2. Millum Gjáir (Gjógvin Heimara og Gjógvin Norðara, har gøtan liggur ímillum)

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 16. september 2024:**

Mælt verður at fylgja tilráðing nummar 2 hjá veganavnanevndini og kalla vegin Millum Gjáir.

**Býráðið 25. september 2024:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 48/24 Umsókn um sundurbýti matr.nr. 92f í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 56/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 48/24 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsóknina um sundurbýti av matr.92f í Sandavági til tvíhús til ummælis.

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**

Mælt verður til at taka undir við tilmælinum frá umsitingini

**Býráðið 25. september 2024:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 49/24 Umsókn um sundurbýti matr.nr 210a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 60/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 49/24 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti av matr.nr 210a í Sandavági til Vága kommunu til ummælis.

Viðmerkingar frá umsitingini:

Byrðar um sundurbýti eru tinglýstar á ognina, mælt verður til at kunnað umhvørvisstovuna, um tinglýstu byrðarnar.

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**

Tekniska nevnd mælir til at kunnað umhvørvisstovuna um tinglýstar byrðar

**Býráðið 25. september 2024:**

Viðmælt. Og kunnað umhvørvisstovuna um tinglýstar byrðar.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 50/24 Umsókn um marknaumskipan millum matr.nr 258c og 78a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 57/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 50/24 |

**Málslýsing:**

Umhvørvisstovan hevur sent kommununi umsókn um marknaumskipan millum matr.nr 258c og 78a í Sandavági til ummælis.

Talan er um at býta uml.43m² av matr.nr 258c og leggja hetta saman við matr.nr 78a

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**

Mælt verður til at loyva marknaumskipani

**Býráðið 25. september 2024:**

Viðmælt.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**51/24 Áheitan at gera matr.nr83u í Sandavági til fríøki**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 55/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 51/24 |

**Málslýsing:**

Borgarar í ovara sørpum, hava heitt á kommununa at gera matr.nr 83u til fríøki, fyri at at gera øki á smæruteigi tryggari hjá børnum at spæla og bilum at koma til og frá smæruteigi.

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**

Tekniska nevnd mælir til at gera matr.nr 83u í Sandavági til øki (F) fríøki, og at matr.nr 83s í Sandavági verður gjørt til øki (B) byggiøki

**Býráðið 25. september 2024:**
Bjarni Prior luttekur ikki í viðgerðini av málinum. Albert Ellefsen varaborgarstjóri, leiðir fundin.

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 52/24 Umbøn um girðing við matr.nr 331c

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 59/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 52/24 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr.nr 331c í Sandavági heitir á Vága kommunu, at gera stálrekkverk framvið húsinum á miðhjøllum 8, í umbønini verður grundgivið fyri hví hetta verður mett, sum ein uppgáva fyri kommununa, eisini verður upplýst at tað hava verið tvey óhapp síðstu fýra árini.

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**

Tekniska nevnd mælir frá at ganga umsóknini á møti

**Býráðið 25. september 2024:**
Bjarni Prior og Rósa Samuelsen luttóku ikki í viðgerðini. Albert Ellefsen varaborgarstjóri, leiðir fundin.

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

## 53/24 Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr.nr 91q í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 58/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 53/24 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 25. september 2024:**

Samtykt at taka málið av skrá.

Formansváttan:_______________

VÁGA KOMMUNA

## 54/24 Umsókn um fyribilsloyvi at seta skúr við bátahylin í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.09.2024 | 18/24 |
| 2 Tekniska nevnd | 12.09.2024 | 53/24 |
| 3 Býráðið | 25.09.2024 | 54/24 |

**Málslýsing:**

Felagið sjógleði søkir um fyribils loyvi, at seta ein skúr til dypparnar í innviku við bátahylin í Sandavági. Talan er um sama øki, sum fyrr er søkt um, men umsóknin er broytt til eitt fyribilsloyvi.

**Vinnu- og havnanevndin 12. september 2024:**

Ein meiriluti Sólfríð Jacobsen, Dagbjørn Hansen, Jónhard Selfoss og Ásla Leila B. Johansen mæla frá at geva fyribilsloyvi á øki ið søkt er um.
Ein minniluti Jóanis Albert Nielsen mælir til at geva fyribilsloyvi í eitt ár, samstundis sum arbeitt verður við loysnum, sum mælt er til áður.

**Tekniska nevnd 12. september 2024:**

Ein meiriluti Sólfríð Jacobsen, Dagbjørn Hansen, Jónhard Selfoss og Tordis Dam. Johannesen mæla frá at geva fyribilsloyvi á øki ið søkt er um.
Ein minniluti Jóanis Albert Nielsen mælir til at geva fyribilsloyvi í eitt ár, samstundis sum arbeitt verður við loysnum, sum mælt er til áður.

**Býráðið 25. september 2024:**

Samtykt at taka undir við minnilutanum í teknisku nevnd.

Ein minniluti, sum er Sólfríð Jacobsen og Jónhard Selfoss mæla til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 55/24 Møguligt keyp av matr. nr. 139, 179b, 207 og 315a í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.09.2024 | 58/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 55/24 |

**Málslýsing**

Borgarstjórin ynskir at leggja mál fyri býráðið, um møguligt keyp av matr. Nr. 139, 179b, 207, og 315a í Sandavági. Talan er um økið har bilverkstaður stóð mitt í bygdini í Sandavági. Bilverkstaðið brendi í grund í mars mánað 2016, og fekk eigarin noktan frá býráðnum at byggja verkstaðið uppaftur. Síðani tá hevur økið ligið óbrúkt, annað enn til goymslu av bilum og øðrum, til stóran ampa fyri bygdafólkið.

Borgarstjórin hevur verið í samband við eigaran av ognini, og er eigarin sinnaður at selja ognirnar til kommununa fyri kr. 1.000.000,00.

Býráðið verður biðið um at taka støðu til uppskotið um at keypa matr. Nr. 139, 179b, 207 og 315a í Sandavági fyri omanfyrinevndu upphædd.

Keypið verður fíggjað við eykajáttan.

**Fíggjarnevndin 18. september 2024:**

Viðmælt at keypa.

**Býráðið 25. september 2024:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 56/24 Uppskot frá borgarstjóranum um, at fíggja fjarlestur til meritnámsfrøði hjá starvsfólkum á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 16.09.2024 | 47/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.09.2024 | 55/24 |
| 3 Býráðið | 25.09.2024 | 56/24 |

**Málslýsing:**

Tórshavnar kommuna hevur seinasta árið skipa fyri, at starsvfólk hjá teimum kunnu verða fjarlesandi á meritútbúgving til námsfrøði á VIA í Viborg. Henda skipan hevur riggað væl, og byrjar ein nýggjur flokkur í vár. Í hesum sambandi hevur verði skipað fyri kunningarfundi, har umboð fyri Vága kommunu eisini hava luttikið.

Tað snýr seg um, at starvsfólk kunnu verða fjarlesandi, samstundis sum tey eru til arbeiðis á dagstovnum hjá kommununi. Starvsfólkini brúka áleið 2-4 tímar um vikuna í dagtímunum uppá útbúgvingina, og eru á útbúgvingarstaðnum áleið 10 dagar hvørt semestur.

Skipanin er tann, at starvsfólkini standa sjálvi fyri øllum viðvíkjandi skúlagongdini. Starvsfólkini fáa ikki løn tá tey eru í skúla, men kommunan rindar fyri skúlagongdina og veitur dagpengar tá tey eru burtur og eitt eingangsgjald fyri ferðing.

Samlaði kostnaðurin fyri hvørt starvsfólk er mettur til kr. 36.000 ár, og tekur útbúgvingin 3,5 ár.

Borgarstjórin skjýtur upp, at seta kr. 180.000 av á fíggjarætlanini fyri komandi ár, sum svarar til at kommunan kann rinda kostnaðin fyri 5 starvsfólk at fara undir útbúgvingina.

Nevndin verður biðin um at taka støðu til um peningurin skal setast av til í næsta ár.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 16. september 2024:**
Mælt verður til at peningur verður avsettur á komandi fíggjarætlan.

**Fíggjarnevndin 18. september 2024:**
Viðmælt at taka undir við mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 25. september 2024:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

**57/24 Ivanshús**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.09.2024 | 60/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 57/24 |

**Málslýsing**
Borgarstjórin vil hava fíggjarnevndina at taka støðu til um Vága Kommuna skal selja sín lutfalsliga part í Ivanshúsið til Sørvágs Kommunu, so ognarluturin svarar til samstarvsavtaluna.

Søluprísur: 2.300.000*0,38= 874.000
Sum Vága Kommuna avsetir til viðlíkahald. Og Sørvágs Kommuna avsetir forholdsvís tað sama til viðlíkahald.

**Fíggjarnevndin 18. september 2024:**
Viðmælt.

**Býráðið 25. september 2024:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

VÁGA KOMMUNA

# 58/24 Fíggjarætlan fyri 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.09.2024 | 59/24 |
| 2 Býráðið | 25.09.2024 | 58/24 |

**Málslýsing**

Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja fram uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember 2024.

**Uppskot hjá umsitingini**

Roknað er við einum skattaprosentið uppá 21,5%
Barnafrádrátturin verður 6.500,- kr.

Fíggjarætlanin javnvigar við kr. 130.978.091
Raksturin verður mettur til kr. 111.528.091
Løgur vera mettar til kr. 19.450.000
Inntøkurnar vera mettar til kr. 124.217.159
**RLÚ-hall uppá kr. 6.760.932**

**Fíggjarnevndin 18. september 2024:**

Viðmælt.

**Broytt uppskot dagf. 25.09.2024**

Roknað er við einum skattaprosentið uppá 21,25%
Barnafrádrátturin verður 6.500,- kr.

Fíggjarætlanin javnvigar við kr. 126.178.091
Raksturin verður mettur til kr. 111.528.091
Løgur vera mettar til kr. 14.650.000
Inntøkurnar vera mettar til kr. 127.217.159
**RLÚ- avlop uppá kr. 1.039.069**

**Býráðið 25. september 2024:**

Einmælt samtykt.

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 18.49

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Jacobsen

Jóanis Albert Nielsen

Jóhan á Mýrini

Formansváttan:__________